# Ársins virki kjósast

**Í kvøld, fríggjakvøldið, verður Ársins virki 2001 kosið. Tað er Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum stendur fyri tiltakinum, sum samstundis eisini rúmar fleiri fyrilestrum**

KJÓSAN
*Heri á Rógvi*

Í dag, fríggjadagin, skipar Føroya Arbeiðsgevarafelag, Vinnuhúsið, fyri einum sokallaðum vinnudegi. Tað er á hesum vinnudegi, at umboð fyri limirnar í Føroya Arbeiðsgevarafelag og onnur hittast. Tiltakið verður hildið í Norðurlandahúsinum.

Hæddarpunktið á vinnudegnum verður, tá ið Ársins virkið verður kosið. Í fjør var tað Havsbrún í Fuglafirði, sum rann avstað við tí heitinum og snøggu standmyndini, ið fylgir við heiðurinum. Hóast fleiri royndir eru gjørdar, so vil Vinnuhúsið ikki siga nakað um, hvør tað verður, sum kann kallað seg ársins virki 2001. Røddir vilja vera við, at talan er um eina alifyritøka, men hetta vil Jan Mortensen, stjóri fyri Vinnuhúsið, ikki siga nakað um.

Umframt at velja ársins virki ætlar Føroya Arbeiðsgevarafelag í ár fyri fyrstu ferð at heiðra eitt virkið, sum hevur gjørt eitt serligt átak, ella ein persón, sum hevur gjørt nakað serligt, sum hevur givið ella kann geva vinnuligan framburð.

– Ásannandi, at Føroyar eru ein lítil tjóð, so er tað ikki víst, at hetta verður gjørt á hvørjum ári, verður sagt úr Vinnuhúsið.

Eins og í fjør, so koma eisini útlendskir gestir til Føroya at vera við á vinnudegnum. Í ár kemur Tarald Sivertsen og Puol Tørring til Føroya at halda hvør sín fyrilestur.

Tarald Sivertsen er norðmaður, og hann er í dag formaður í norska Havbrúnaðarfelagnum, umframt at hann eisini eigur fyritøkuna Follalaks. Hansara 40 minuttir langi fyrilestur hevur heitið Alivinnan og framtíðin.

Poul Tørring er ein kendur maður í donskum vinnulívi, og hann fer á vinnudegnum at halda ein fyrilestur, ið kallast fyri Arbeiðsmarknaðurin – tann globala avbjóðingin hjá Evropa. Poul Tørring eigur í dag eig trolvirki, sum kallast fyri Utzon, men hevur eisini verið nógv umtalaður í Danmørkini, tá ið hann bæði hevur verið aktivur í ES høpi, og hann hevur eisini verið stjóri í bransjufelagnum hjá dansku fiskavirkjunum og fiskaútflytarum.

Umframt hesar báðar, so sleppa eisini Jørn Astrup Hansen og Bjarni Djurholm framat mikrofonini í Norðurlandahúsinum.

Ólavur Rasmussen, prestur, fer at siga nøgur orð um heimin eftir 11. september á vinnudegnum. Vinnudagurin er ikki almennur, men tað skal meldast frá luttøku, og tiltakið endar við einum galladøgurða á Hotel Føroyum.

UTTAN ÚR HEIMI

# Týsk stjórnarkreppa kann enda við vali

**Gerhard Schröder, kanslari hevur sagt, at fellir samveldistingið uppskotið um at senda týskar hermenn til Afghanistan, verður tað tulkað sum misálitisváttan á kanslaran.**

ÚTLAND:

Atkvøðugreiðslan verður klokkan ellivu í dag, og hon fer at vísa, um teir atfinningarsomu tinglimirnir hjá Teimum Grønu fara at taka undir við kanslaranum, ella teir halda fast um sjónarmiðið, at týskir hermenn skulu ikki sendast í bardaga í Afghanistan.

Í týska samveldistinginum eru 666 limir. Gerhard Schröder, kanslari og Joschka Fischer, uttanríkisráðharri, sum sjálvur umboðar Teir Grønu í stjórnini, skulu hava undirtøku frá 334 tinglimum fyri at fáa meiriluta.

Teir báðir stjórnarflokkarnir hava 341 tinglimir aftan fyri seg, og sostatt kunnu í mesta lagi sjey atkvøða ímóti. Men trupulleikin er, at átta tinglimir hjá Teimum Grønu hava higartil sýtt fyri at taka undir við uppskotinum hjá kanslaranum og uttanríkisráðharranum. Sjey teirra hava kortini boðað frá, at teir eru sinnaðir at umhugsa støðu sína eina ferð afturat, men tann áttandi hevur gjørt greitt, at hann letur seg ikki vika.

### Heldur val

Joschka Fischer tekur undir við at senda týskar hermenn til Afghanistan, hóast fleiri veljarafeløg hjá Teimum Grønu hava gjørt greitt, at tey eru ímóti uppskotinum.

Upprunaliga søgdu 25 tinglimir hjá sosialdemokratunum, at teir fóru eisini at atkvøða ímóti, men allir broyttu hugsan, tá Gerhard Schröder boðaði frá, at atkvøðugreiðslan eisini var ein spurningur um álitisváttan á seg sum kanslara.

Skuldi tað hent, at Schröder tapir atkvøðugreiðsluna, nýtist honum ikki at fara frá kortini. Sambært reglunum kann stjórnin halda fram sum minnilutastjórn, so leingi meiriluti ikki er fyri einum øðrum kanslara. Men leiðslan hjá sosialdemokratunum hevur sagt, at tapir kanslarin í dag, fer flokkurin at mæla honum til at skriva út nývál.

*(Fartekst)*

# Funnu uppskrift til kjarnorkubumbu

Millum skjølini, sum vórðu funnin í einum húsum í Kabul, var ein vegleiðing um, hvussu til ber at gera eina kjarnorkubumbu. Felagsskapurin hjá bin Laden plagdi at halda til í húsunum.

Tað var bretska blaðið The Times, sum bar tíðindini í gjár. Sambært blaðnum var ein av teirra egnu tíðindamonnum hjástaddur, tá menn hjá Norðursamgonguni komu fram á pappírini í húsunum. Ein partur av pappírunum vóru illa farin, og tað var týðiligt, at onkur hevði roynt at brenna tey.

Skjølini, sum vórðu funnin í húsunum, vóru á arabiskum, týskum, enskum og urdu og lýstu, hvussu farast skal fram, tá ein kjarnorkubumba skal gerast.

Yvirgangsmaðurin Osama bin Laden hevur sjálvur sagt, at hann hevur eina kjarnorkubumbu, men bretski verjumálaráðharrin, Geoff Hoon, vísir hesum aftur. Í samrøðu við The Times sigur hann, at kanska hevur al-Qaeda ymiskt tilfar til eina kjarnorkubumbu, men hinvegin kendi hann seg sannførdan um, at felagsskapurin er ikki førur fyri at gera eina tílíka bumbu.

Sambært keldum í Kabul vórðu hesi húsini nýtt sum venjingarlega hjá al-Qaeda, áðrenn Norðursamgongan tók býin. Nógv skjøl sløgdust inni í húsunum, og sambært The Times funnu hermenninir eitt nú vegleiðingar í sambandi við flúgving og navigatión umframt fleiri landakort.

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýndan heiður og samkenslu,
tá kæri maður mín, pápi, abbi, verfaðir
og beiggi okkara

**Birgir Danielsen**
Tórshavn

doyði og varð jarðaður.

Takk til tykkum øll, ið fylgdu honum
til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Bina, Gunn og Uni**


SAMBANDSFLOKKURIN

ATLI HANSEN
RÍKISFELAGSSKAPURIN
-ein verja fyri frælsi,
menning og vælferð.
X við B

# Umhvørvið á dagsskránna

**– Føroyingar eru ikki nóg tilvitaðir um umhvørvið, og tí er tað neyðugt við einum stovni, ið kann leggja kommununum lag á við umhvørvisvinarligum tiltøkum, sigur Barbara Samuelsen, ið er samskipari fyri at seta á stovn eina Lokal Agenda 21 skrivstovu í Føroyum**

UMHVØRVI
*Stefan í Skorini*

Kommunurnar í Føroyum hava saman við oljumálastýrinum tikið stig til eina umhvørvisskrivstovu, ið skal leggja kommununum lag á við umhvørvisvinarligum tiltøkum. Í næstum verður bræv sent til allar kommunur í Føroyum, har spurt verður, um tær eru áhugaðar í at vera við í eini slíkari skrivstovu.

Brøvini verða væntandi send í hesum mánaðinum. Kommunurnar kunnu tó sjálvar velja, um tær vilja vera við ella ikki.

### Stórur tørvur

Stórur tørvur er á eini skrivstovu, ið hevur sum endamál at seta í gongd og menna umhvørvisvinarlig tiltøk. Higartil hevur lítið og einki verið av slíkum, og flestu kommunurnar hava ikki gjørt nakað serligt fyri at verja umhvørvið.

Nú skal tó broyting koma í. Barbara Samuelsen hevur verið samskipari fyri oljumálastýrið, Kommunusamskipan Føroya og Føroya Kommunufelag, ið hava tikið stig til skrivstovuna.

Hon hevur skipað fyri ymsum tiltøkum í hesum sambandi. Fyri kortum høvdu tey vitjan av smáum kommunum úr hinum Norðurlondunum. Hesin bólkurin vitjaði støð í Føroyum, ið hava framt umhvørvisvinarlig tiltøk. Tey eru Klaksvík, har ein áhugabólkur arbeiðir fyri at fáa sil aftur í Ósánna, í Vestmanna eru tey farin undir at planta trøð, og ferðalagið vitjaði eisini í Sundalagnum.

Eisini vitjaðu tey føroysku umboðini saman við teimum norðurlendsku í Íslandi, har tey fingu nøkur góð hugskot um, hvussu hiti kann nýtast umaftur.

Har var eitt frystihotel, og hitin frá motorunum varð leiddur út á parkeringsplássið, so tað ongantíð frysti. Eisini varð hiti leiddur inn í skrivstovurnar og øll rúmini í bygninginum. Hetta er eitt dømi um, hvussu hiti kann endurnýtast.

### Neyðugt við ætlan

Barbara Samuelsen heldur, at tað týdningarmiklasta er, at kommunurnar seta eina greiða ætlan útí kortið. Tá skrivstovan fer undir sítt virksemi, fer hon at hava eina 5-ára ætlan, og hvørji mál skulu náast í hesum tíðarskeiðnum.

Barbara heldur, at hvør kommuna sær skal gera eina langtíðarætlan fyri, hvørji umhvørvisvingarlig tiltøk hon ætlar sær at fremja í verki.

Uppgávan hjá skrivstovuni verður at leggja kommunum lag á og at vera ein ígongdsetari hjá teimum. Hetta skal birta uppundir umhvørvisvernd, sum føroyingar ikki hava verið nóg tilvitaðir um higartil.

Ein verkætlan varð sett í verk í 1997, men hon datt niðurfyri aftur. Nú verður tátturin tikin uppaftur, og vónandi verður hetta meira støðugt.

Barbara Samuelsen sigur, at hon eisini er við í einum bólki, ið skal orða ein sonevndan umhvørvispolitikk fyri Landsstýrið. Tey mál, ið verða feld niður í hesum bólkinum, skulu leggjast fram á einum National Agenda 21 fundi í Suður Afrika í september næsta ár.

Barbara Samuelsen væntar og vónar, at kommunurnar fara at taka undir við hesum átakinum og stuðla umhvørvisskrivstovuni. Skrivstovan er bílig, tí bara eitt fulltíðarstarv er tengt at henni. Kommunurnar gjalda eina upphædd fyri hvønn íbúgva, so at tær størru kommunurnar átaka sær størsta partin av útreiðslunum.

Lokal Agenda 21 er eitt heimsumfevnandi átak, og her í Norðurlondum hava nógvar kommunur tikið stig til umhvørvisvernd.

*Barbara Samuelsen heldur, at miðvísur umhvørvispolitikkur stórliga vantar í Føroyum. Hon vónar tí, at føroysku kommunurnar fara at taka undir við eini skrivstovu, ið hevur til endamáls at birta uppundir umhvørvisvinarlig tiltøk*
*Mynd: Jens Kr. Vang*